gult cyan magenta svart



# Færri og størri Eimskip

*Saman við íslendska stórabeiggjanum spennir Eimskip Føroyar seg rættiliga út. Tvey stór bingjuskip fara í næstum at røkja siglingina, og flutningstíðin til Rotterdam verður stytt við tveimum døgum*



*Í næstum fara nýggj og størri skip at røkja siglingina hjá Eimskip til og úr Føroyum*

DIA MIDJORD

Fyrst í oktober verður øll siglingarætlanin hjá Eimskip løgd um. Henda broytingin førir við sær, at tvey skip fara at røkja siglingina til og úr Føroyum, sum í dag verður røkt av fýra skipum. Og rutukervið verður eisini broytt.

Á skrivstovuni hjá Eimskip Føroyar ivast tey ikki eina løtu, at hetta fer at betra tænastuna og geva eitt enn betri reglusemi.

– Viðskiftafólkini mugu hava vøru sína mánamorgun. Tað hevur eydnast væl higartil, men nýggju skipini, ið bæði eru størri, skjótari og tøkniliga meira framkomin, fara at gera tænastu okkara enn meira álítandi, sigur Linda Gunnlaugsdottir, stjóri á Eimskip Føroyum

**Alt teldustýrt**

Hvørt av teimum nýggju skipunum tekur góðar 1450 bingjur. Tað ljóðar av nógvum, men tað er kortini ikki so torført at ansa og hava eftirlit við teim mongu køli- og frystibingjunum. Hetta verður nevniliga alt stýrt við eini teldu á brúnni.

Nýggja siglingarætlanin styttir flutningstíðina til Rotterdam úr fýra til tveir dagar. Allur farmur til Bretlands fer umvegis Rotterdam, ið er eitt av knútapunktunum í Europa. Og farmur, ið verður sendir úr Århuus seinast í vikuni, er í Havn mánadagin eftir.

– Broytingarnar verða gjørdar fyri at tillaga tænastuna til tørvin hjá viðskiftafólkunum. Og sjálvandi eisini fyri at styrkja um kappingarførið hjá felagnum, sigur nýggi stjórin.

**Risar**

Skipini, ið koma at sigla upp á Føroyar, sigla í dag við bingjum millum Singapore og Australia. Og talan er ikki um nakrar lítlar jollur. Skipini eru 166 metrar til longdar og taka á leið 1450 bingjur ella lasta góð 17.000 tons.

Og ein avleiðing av hesum er, at klaksvíkingar ikki longur fáa eimskipini á vitjan. Kortini lovar Eimskip Føroyar, at norðingar ikki skulu verða við sviðusoð. Teir fáa somu flutningssømdir sum áður.

Nýggja farleiðin hjá Eimskip er ikki endaliga fastløgd, men skipini skulu sigla til Føroyar, Hollands, Týsklands, Svøríki, Noregi, Danmarkar, Føroyar og Íslands.

Nýggju skipini, ið verða sett at søkja siglingina fyrst í oktober, vórðu bygd í 1995 og kostaðu 175 milliónir krónur hvørt.

# Ókend fólk hava keypt Cafe Natúr

*Turid Samró, eigari av caféini fram til 1. september, vil ikki siga, hvør nýggi eigarin er. Men hon sigur, at talan er um óroynd fólk í vinnuni*

DIA MIDJORD

Eigarin av Café Natúr, Turid Samró, er ikki serliga prátingarsom, tá vit spyrja hana, hvør tað nú er, ið hevur keypt Cafe Natúr. Søgurnar eru farnar at ganga, og bæði Club 20, Poul Mikkelsen, Ingi Mohr og aðrir góðir menn hava verið nevndir sum keyparar.

Men sambært eigaranum er eingin teirra millum keypararnar.

– Eg trúgvi ikki at nakar kann gita, hvør nýggi eigarin er. Hesi fólkini eru slettis ikki í bransjuni í dag, sigur Turid Samró.

– Tú kanst siga, at hesi fólkini eru eins óroynd og eg, tá eg á sinni byrjaði við Cafe Natúr, sigur Turid.

Hon vil heldur ikki út við, hvørt tað er talan um føroyingar ella útlendingar.

– Eg havi bíðað eftir røttu fólkunum at taka yvir og bera tað víðari í sama anda, sum eg havi gjørt. Tey eru nú funnin, men eg ætli mær ikki at gloppa munnin fyrr enn í fyrsta lagi hálvan august, sigur eigarin av mest umtalaðu cafeini í Føroyum seinastu tíðina.

Tá eru fjúrtan dagar til lykilin verður handaður teimum nýggju eigarunum.


*1. september verður lykilin handaður nýggju eigarunum, sum sambært verandi eigari eru eitt óskrivað blað í hesi bransjuni*

# Skal fíggjarstýra SvF



RÚNAR REISTRUP

Sjónvarp Føroya søkir nú eftir sokallaðum fyritaksstjóra. Hesin skal hava ábyrgd av dagliga rakstrinum av stovninum, bæði fíggjarliga og fyristingarliga.

Starvið sum fyritaksstjóri í SvF liggur beint undir sjónvarpsstjóranum, ið situr við sjálvari ábyrgdini av stovninum.

Sjónvarp Føroya kom í svára fíggjarliga kreppu herfyri orsakað av ov vánaligari fíggjarstýring, og tað verður uppgávan hjá nýggja fyritaksstjóranum at syrgja fyri, at hetta ikki kemur fyri aftur.

Freistin av søkja starvið sum fyritaksstjóri hjá Sjónvarpi Føroya er fríggjadagin 25. august.




**Merzedes 110 CDI vøruvognur**

Sera vælhildin, hvítur, við alufelgum, km 28.000, ár mai 1999 (nýggjur við alufelgum kr. 229.000). Bilurin hevur koyrt mest í Noregi.

Til sølu fyri **kr. 175.000,00**

P/f. D. B. Bilar

J. Broncksgøta 15 · Tlf. 310600

**FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT**

SAFARI TRANSPORT

GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR

Tlf. 32 22 22

**DANNY TRANSPORT**

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**


**Stóra bringu**

**-ella lítla?**

**Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-stødd?**

**Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína stødd. Ring til okkum og avtala tíð.**

**Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.**

Sosialurin - 311820

**Vit hava eisini korsilett í stórum støddum**

siri liv & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18 • 100 Tórshavn • Tel./Fax 316610

**Reyði krossur Føroya**

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánad., mikud. og fríggjad. frá kl. $19^{00}$ til $21^{00}$

☎ 212380


**Í býin** *Í býin Í býin*

**- altíð eitt stað at fara**

**Streymoy**


fk **Mat-seðilin**

Hósdagin 3. august
**Svínakambur**

Fríggjadagin 4. august
**Lambafrikassé**

Leygardagin 5. august
**Kotelettir**

Mánadagin 7. august
**Medistarpylsa**

Týsdagin 8. august
**Lasagna**

Mikudagin 9. august
**Fiskafrikadellur**

*Kostnaður 32.- kr.*

•••

**Seinnaparts-tilboð**
*frá kl. 14.00:*
**Juniorburgari 14,95**
**Maxiburgari ella Búffsandwich 19,95**

***Matstovan í Hoyvík***

**NÁTT-BUSSURIN**
**hjá Øssuri Christiansen**

**Leygarkvøldið:**
- **Úr Vestmanna kl. 24**
- **Úr Tórshavn kl. 01**
- **Úr Vestmanna kl. 04**
- **Úr Tórshavn kl. 05**

**(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)**

**Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu**



**Tlf. 424254**
**Bussarnir:**
**Tlf. 287752 • 286254**

**AUTO**

**- Dag sum nátt -**
**- skjótt og gott -**

**Skalt tú bil hýra - so er tað 311234**

**AUTO**

**BENZIN DIESEL KIOSK**
***- ALT DØGNIÐ -***

**AUTO 311234**

**Lesið sosialin sosialin osialin -tað loysir seg**





**Í BÝIN**

**Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum**

**sosialurin**

***Nor›oyggjar***


**Klaksvíkar Klubbi**

***Dansur verður leygarkvøldið 5. august "Jan" vendir plátum!***

**Klubbin hevur: POOLBORÐ BILLARDBORÐ ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY**


**Vilja tygum vi› í**

***Í b‡in*** **- hvønn hósdag**

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum ***í b‡in***, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur